# Nøvn

## TØKK

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi.

**Jákup Martin Sólbjørg**

andaðist og varð jarðaður

***Familjunar vegna***

***Ella, Jákup Pauli, Jónfríð, Hallgerð, Svanhild og Eyðbjørg***

## TØKK

Øllum tykkum, ið á ymsan hátt sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Lina Joensen**

andaðist og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

***døturnar***

## TØKK

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 17. juli.

***Signhild oman Tún***

***Froðba***

## Føðingar



Hesa didduna eiga Eir Jógvansdóttir Olsen og Jóhan Troest Davidsen. Hon er fødd á Ríkissjúkrahúsinum tann 27. juli 2010 og hon vigaði 3450 gr. og var 51 cm long.

9. august fingu Liezl D. Hilig og Steinbjørn V. Olsen Argir, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2950 gr.

11. august fingu Randi Olsen og Rói Jakobsen ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4050

11. august fingu Annika Bolton Mortensen og Jónas Bloch Danielsen, Velbastað, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3715 gr.

17. august fingu Andrea Bergitta Isaksen Dam og Høgni Dam, Streymnes ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

19. august fingu Doretha og Karstin Joensen, Runavík, eina dóttir. Hon var 52 cm long og vigaði 3550 gr.

## Merkisdagar

### Prógv

Poul Niclasen, Klaksvík, hevur lokið prógv sum cand.mag í enskum, við hjágrein í bókmenta- og mentanarsøgu við lærda háskúlan í Keypmannahavn.

### Gullbrúdleyp

Sunnudagin 22. august kunnu Eyðbjørg og Elmar Jacobsen Søldarfjørður halda gullbrúdleyp. Tey verða burturstødd dagin.

### Silvurbrúdleyp

Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534/224635.

### 90 ára føðingardagur

17. august fylti Jóhan Norðfoss, Tórshavn, 90 ár. Tey, ið ynskja heilsa uppá Jóhan, eru hjartaliga vælkomin í húsið hjá Starvsmannafelagnum 21. aug. frá kl. 12 til 16.

### 80 ára føðingardagur

16. august fylti Sonja Samuelsen í Søldarfirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Elim, leygardagin 21. august frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 22. august verður Páll Jóanesarson Saltangará 70 ár. Dagurin verður hildin í hølinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

### 65 og 75 ára føðingardagur

Leygardagin 21. august halda Jensya Magnussen (Kastalag) 75 ára og Karin Kastalag 65 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Eldrafelagnum NÓN, Torvgøta 2 í Saltangará frá kl. 13 – 19.

### 60 og 70 ára føðingardagur

13. august fylti Sólbjørg Thomasen, Tórshavn, 60 ár og fríggjadagin 27. august fyllur Hilda Debes, Oyri, 70 ár, Systrarnar halda føðingardagin í Eydnuni á Oyrabakka leygardagin 28. august kl. 17 og úteftir. Tey, ið ynskja at heilsa uppá okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 23. august á tlf. 313448/503448 (Sólbjørg) ella 422234/266334 (Hilda)





### Brúdleyp

Leygardagin 21. august kl. 10 giftast í býráðshøllini í Klaksvík, Hanna Mikkelsen og Jóan Petur Brandal. Tey, ið ynskja at gleða okkum, á hesum stóra degi, eru vælkomin til reseptión, sum verður í Skálanum ímillum kl. 14 og 18.

### Brúdleyp

Leygardagin 21. august giftast Eydna Dahl, Klaksvík og Jens Súni Hansen, Argir. Vígslan verður í Christianskirkjuni kl. 14. Brúdleypi verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19 fyri innboðin.

# Kári P fyllir 60 ár



Sunnudagin 22. august fyllir Kári Leivsson, ella Kári P, sum hann eisini verður nevndur, 60 ár.

Kári, ið er best kendur sum fólkatónleikari, tók studentsprógv á Føroya Studentaskúla í 1970. Eftir tað arbeiddi hann sum blaðmaður, húsasmiður og sjúkrarøktari. Hann hevur m.a. lisið málfrøði og bókmentir við Háskóla Íslands.

Á listaliga økinum hevur hann mest fingist við yrkingar til egin løg, og fyri útgávur sínar „Vælferðarvísur" (1979) og „Hinumegin Ringvegin" (1991) fekk hann í 1995 M.A. Jacobsens heiðursløn fyri fagrar bókmentir. Í ár bleiv Kári heiðraður við Mentanarvirðisløn Landsins 2010.

Í 1995 tók Kári embætisprógv í sálarfrøði á universitetinum í Keypmannahavn. Í dag arbeiðir hann sum sálarfrøðingur í Havn.

**-red**